| | |
|---|---|
| **Fra:** | Tróndur Gilli Leivsson |
| **Til:** | BST - Postur |
| **Emne:** | VS: Viðv.: ummælisskriv frá Búnaðarstovuni viðvíkjandi "Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð)" við ummælisfreist 14. november 2025. |
| **Dato:** | 14. november 2025 14:25:00 |
| **Vedhæftede filer:** | image001.png |

---

**Fra:** Tróndur Gilli Leivsson
**Sendt:** 14. november 2025 14:25
**Til:** Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>
**Cc:** 'lms@lms.fo' <lms@lms.fo>
**Emne:** Viðv.: ummælisskriv frá Búnaðarstovuni viðvíkjandi "Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð)" við ummælisfreist 14. november 2025.

Til Løgmansskrivstovuna.

Víst verður til framløguna av lógaruppskotinum "Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð)" við ummælis freist 14. november 2025.
Búnaðarstovan skal eisini innleiðandi loyva sær at vísa til áður sent ummælisskriv í málinum um fyrireikingar av undirsjóvartunli til Suðuroyar frá 11. desember 2024, sí niðanfyri.

Føroya Løgting samtykti í vár ein framskygdan landbúnaðarpolitikk fyri tíðarskeiðið 2025 – 2035, har dentur er lagdur á at menna eina økta sjálvsveitan av landbúnaðarmatvørum, undir hesum m.a. at skipa fyri eini øktari grønmetisvelting.
Um sama mundi samtykti Føroya Løgting somuleiðis broytingar í løgtingslóg um landsjørð, ið herðir verjuna av góðum landbúnaðarlendi munandi; ásannandi, at slík lendi eru eitt skortanartilfeingi (DK=knaphedsressource) í Føroyum, og at umskipan av tílíkum lendi til aðra nýtslu er at meta sum ein óafturvendandi (DK=irreversibel) umskipan.

Í norðurlendskum og í altjóða høpi eru spurningar um matvøruveitingartrygd, sjálvsveitingarstig av matvørum og treystleika (resiliens) í heimligu skipanunum vorðin týðandi politiskir spurningar á dagsskrá. Í hesum høpi kann verða víst til sonevndu *"Karlstad fráboðanina"* frá juni 2024, samtykt av norðurlendsku ráðharrunum í FJLS-ráðharraráðnum (fiskivinna, landbúnaður, matvørur og skógarbúnaður).

Búnaðarstovan tekur ikki støðu til spurningin um ein Suðuroyartunnil ella ikki, men Búnaðarstovan sær tað tó hinvegin sum sína upplýsingarskyldu, sum fakmálastovnur á landbúnaðarøkinum, at gera vart við, at verandi uppskot til ummælis avgjørt er í andsøgn við tey omanfyri nevndu viðurskifti, og at hesi evni heldur ikki hava fingið eina nøktandi viðgerð í fyrireikingartilgongdini.
Bæði heima á Sandi, eins og í Sandvík, fara ætlaðu vegaføringarnar sambært uppskotinum gjøgnum ivaleyst nakað av landsins gróðrarmiklasta lendi, og í ávísan mun er hetta somuleiðis galdandi fyri ætlaðu vegaføringina í Hvalba. Búnaðarstovan er av teirri áskoðan, at størri atlit áttu at havt verið tikin til hesi viðurskifti í fyrireikingararbeiðinum.

Búnaðarstovan skal vísa á, at m.a. ævinligu samfelagsvirðini av matvøruframleiðslutilfeinginum í teimum lendum, bæði heima á Sandi og í Sandvík og í Hvalba, sum fara fyri skeyti orsakað av ætlaðu lendisumskipanunum, ikki tykjast at hava verið viðgjørd; og hesi atlit tykjast heldur ikki at vera tikin við í teimum fíggjarligu "kost-nyttu" greiningum, sum vera havdar á lofti í spurninginum um ta mest skynsomu farleiðina fyri verkætlanina.

At teir, ið undan fóru, og sum í sambandi við innangarðsútskiftingina heima á Sandi afturi í 1975, valdu at leggja ein bygdarveg gjøgnum Todnesbøin (í eini tíð, tá minni varð hugsað um at varðveita fruktagott lendi

heldur enn um lagaligar arbeiðsumstøður), er ikki nøkur saklig grundgeving fyri at leggja eina nútímans høvuðsferðsluæðr eftir somu linjuføring, og soleiðis forkoma hesum framúr fruktagóða lendi.

Búnaðarstovan skal tí staðiliga mæla til, at landsmyndugleikin, ið er eigarin av tunnilsfelagnum, áleggur felagnum at viðgera spurningin um linjuføringar av vegakervinum til Suðuroyartunnilin av nýggjum, og í hesum sambandi at skipa fyri eini viðgerð, sum ítøkiliga tekur neyðug og saklig atlit til m.a. Løgtingssamtyktirnar frá í vár eins og "*Karlstad fráboðanina*" frá juni 2024.

Búnaðarstovan er, sum eisini áður fráboðað, altíð fús at veita landsmyndugleikunum landbúnaðarfakliga ráðgeving í sambandi við handfaringina av hesi verkætlanini.

Blíðar heilsur,  Tróndur Leivsson, stjóri

**Tróndur Leivsson,** *stjóri*
trondurl@bst.fo | +298 29 90 10

búnaðarstovan

Frammi í Dal 166 | FO-410 Kollafjørður | Føroyar
Tel. (+298) 479 000 | bst@bst.fo | www.bst.fo

---

**Fra:** Tróndur Gilli Leivsson
**Sendt:** 11. december 2024 23:16
**Til:** Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>
**Cc:** Doris Bjarkhamar <doris.bjarkhamar@tinganes.fo>; BST - Postur <bst@bst.fo>
**Emne:** Viðv.: Ummælisskriv frá Búnaðarstovuni í sambandi við framløgu av løgtingslógaruppskoti "um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum".

Til Løgmansskrivstovuna.

Ummælisskriv frá Búnaðarstovuni í sambandi við framløgu av løgtingslógaruppskoti *"um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum"*.

Búnaðarstovan umsitur landsstýrisins vegna landsjarðirnar sbrt. ásetingum í Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð. Búnaðarstovan metir seg sostatt at vera hoyringspart í hesum máli umboðandi tær landsjarðir, ið kunnu væntast at verða ávirkaðar av verkætlanini.

Í landbúnaðarhøpi eru tað serstakliga jarðirnar á farleiðini millum Sandoyartunnilin og ætlaða Suðuroyartunnilin, har munandi neilig árin eru í væntu fyri landbúnaðaráhugamálini, tó at jarðirnar í ávikavist bæði Sandvík og í Hvalba somuleiðis kunnu vera fyri vanbýti í hesum sama høpi.

Lógaruppskotið veitir *"P/F Suðuroyartunnilin"* ognartøkuheimild til tað lendi, ið verkætlanini tørvar, og sostatt sera víðar heimildir mótvegis øðrum áhugamálum. Búnaðarstovan skal tí viðmerkja, at ein natúrlig fylgja av somikið víðum heimildum eigur at vera, at landsmyndugleikin handan tunnilsfelagið áleggur leiðslu felagsins at sýna størst møgulig atlit fyri teimum náttúru-, lendis- og matframleiðsluvirðum, sum ætlaða

verkætlanin kann fáa árin á, og soleiðis at velja farleiðir, sum hava sum minstan ampa fyri landbúnaðarvirksemið.
Umskipan av landbúnaðarlendi frá matframleiðslu til aðra nýtslu, í hesum føri til undirstøðukervið, viðførir eina óafturvendandi (irreversibla) broyting frá matframleiðslulendi til aðra nýtslu. Gott landbúnaðarlendi til matframleiðslu er eitt sokallað skortanartilfeingi (DK=knaphedsressource) í Føroyum, og varðsemismeginreglan eigur tí at verða nýtt í slíkum málum.

Landsstýrismaðurin, ið umsitur landbúnaðarmál, arbeiðir í hesum døgum við lógaruppskoti, ið skal styrkja verjuna av góðum landbúnaðarlendi móti umskipan til aðra nýtslu.
Somuleiðis er neiliga gongdin seinnu áratíggjuni at umskipa matframleiðslulendi til onnur útbyggingarendamál sett ovarlaga á dagsskránna í norðurlendska samstarvinum; har evnið m.a. er ítøkiliga umrøtt í sonevndu Karlstad fráboðanini frá juni 2024, sum ráðharrarnir í FJLS ráðharraráðnum (fiskivinna, landbúnaður, matvørur og skógarbúnaður) samtyktu í summar, og sum Føroyar tóku undir við.

Vegaloysnirnar í sambandi við ætlaða Suðuroyartunnilin, sum Tunnilsfelagið hevur lagt fram, hava allar munandi neilig árin á landbúnaðarframleiðslumøguleikarnar, serstakliga Sandoyar megin, men somuleiðis Suðuroyar megin. Búnaðarstovan er kunnig um, at uppskot um aðrar loysnir av linjuføringum eru lagdar fram frá ávikavist bæði Landsverki og frá heimafólkinum á Sandi, sum sýna munandi størri fyrilit fyri verju av landbúnaðarframleiðslulendinum heima á Sandi. Búnaðarstovan skal staðiliga heita á landsmyndugleikarnar handan tunnilsfelagið um at áleggja pørtunum í málinum at sýna varðveitingini av landbúnaðarlendinum størst møguligt fyrilit í sambandi við ta víðari handfaringina av hesum stórmáli.

Búnaðarstovan er altíð fús at veita landsmyndugleikunum landbúnaðarfakliga ráðgeving í sambandi við handfaringina av hesi verkætlanini *“um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum”*.

Blíðar heilsur,

Tróndur Leivsson

**Tróndur Leivsson,** *stjóri*
trondurl@bst.fo | +298 29 90 10

búnaðarstovan

Frammi í Dal 166 | FO-410 Kollafjørður | Føroyar
Tel. (+298) 479 000 | bst@bst.fo | www.bst.fo